## Vesturvón skifti manning í Kirkenæs

Vesturvón, sum roynir í Barentshavinum, hevur havt rokfiskiskap, seinastu tríggjar vikurnar hava teir fingið góð 300 tons. Í gjár fór nýggj manning við Atlantsflog til Kirkenæs, heimaftur kom manningin, sum seinastu tríggjar vikurnar hevur rokast umborð á Vesturvón í Barentshavinum. Vesturvón skuldi fara aftur til fiskiskap í gjárkvøldið. Enniberg, sum eisini er eystanfyri, hevur eisini havt góðan fiskiskap. Í farnu viku kom Sundaberg heim, teir høvdu 300 tons, sum teir fiskaðu í fimm vikur. Kvotan hjá Sundaberg eystanfyri er liðug, teir fara nú til Grønlands at fiska svartkalva.

## Vesturtúgva og Grønanes fullir undir lúkurnar

Vesturtúgva og Grønanes komu inn í gjár, teir eru fullir undir lúkurnar. Teir hava 270.000 pund. Í morgun landaði Vesturtúgva í Havn, og Grønanes landar í Vestmanna. Teir hava hendan túrin roynt á Bill Baily, meginparturin er upsi. Vesturtúgva og Grønanes fara nýggjan túr í kvøld.



# Eingin fiskivinnustevna á sjómannadegi

**Tað verður eingin fiskivinnuráðstevna í sambandi við sjómannadagin í Klaksvík á hesum sinni, tí stigtakararnir hini árini siggja lítla meining í hesum tiltaki í løtuni**

SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein afturvendandi partur av sjómannadegnum hevur verið ein stór fiskivinnuráðstevna, sum hevur verið hildin í Klaksvík. Men í ár er lítil hugur at gera so nógv burtur úr hesum partinum, sum annars hevur verið sera væl umtóktur hini árini.

Fiskivinnuráðstevnan í Klaksvík hevur verið væl vitjað, og fyrireikararnir hava øll árini syrgt fyri, at týðandi kreftir innan føroysku fiskivinnuna eru slopnir til orðanna. Útlendskar kreftir hava eisini verið við, eins og politisk umboð og umboð fyri fiskifrøðingar og fólk við skili fyri tølum.

Nú løgtingið er í holt við at áseta fiskidagar fyri komandi fiskiár, og landsstýrismaðurin hevur skotið upp at skerja dagarnar hjá partrolarum við 20% og hjá húkaflotanum við 50%, duga norðoyingar ikki at síggja nakra serliga meining í hesi stevnu.

Í gjár var málið um fiskidagar so til aðru viðgerð á løgtingi, og tá var uppskotið, sum ein minniluti í vinnunevndini hevur mælt til, samtykt.

Tað var minnilutauppskotið hjá Heina O. Heinesen og Pálli á Reynatúgvu í vinnunevndini um eina 20%-skerjing í øllum veiðibólkum, sum vann frama.

Í morgin verður triðja og seinasta viðgerð av málinum um fiskidagar, og tá fæst endaliga at vita, hvussu útfallið verður.

### Lítil meining

John William Joensen, sum er ein av fyrireikarunum aftanfyri sjómannadagin, sigur, at fiskivinnan í Klaksvík ikki hevur serliga stóran áhuga í at skipa fyri fiskivinnuráðstevnuni í ár, nú vinnan metir, at politiski ágangurin er so stórur við stóru skerjingini av fiskidøgum.

Óli M. Lassen, reiðari, sum hevur verið ein av stigtakarunum til fiskivinnuráðstevnuna, viðgongur, at stevnan verður av ongum í ár – júst av hesi orsøk, at gingið verður lívgrundarlagnum hjá vinnuni so nær við skerjingunum.

- Ein týðandi partur av lívsgrundarlagnum hjá norðoyingum er fiski-og útróðrarvinna, og nú løgtingið eftir øllum at døma fer at skerja fiskidagarnar so rívan, at henda vinna kemur á gravarbakkan, halda vit lítla meining vera í at brúka orku upp á eina fiskivinnuráðstevnu, sigur Óli M. Lassen.

# Skálaberg við í mil

**- Vit fegnast um, at hetta millumtjóða samstarv eisini gongur um vinnuna, tí tað hevur stóran týdning, at vinnan er partur av okkara skrásetingar- og skjalaarbeiði, sigur Leon Smith á Fiskirannsóknarstovuni**

KANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Fiskirannsóknarstovan hevur leigað flakatrolaran Skálaberg til eina felags kanning, sum Føroyar, Ísland, Noreg, Rusland og ES eru saman um. Hetta er ein kanning, har eitt sonevnt vísindaligt ekkolodd verður stilla inn, so tað vísir rætt, sum tað verður rópt.

Reiðaríið hjá Skálabergi hevur útvegað sær nýggja ekkolodsútgerð, har alt data, sum ekkoloddið kemur fram á, verður skjalfest og skrásett á teldu. Sum skilst, er henda útgerð á leið hin sama, sum eitt nú svartkjafta-og sildaskipini brúka.

Hetta er fyrstu ferð, at Fiskirannsóknarstovan hevur leigað føroyskt fiskiskip til eina millumtjóða kanning av hesum slagi.

Noreg og Rusland luttaka eisini í kanningini við skipum, ið hava somu útgerð sum Skálaberg. Norska skipið er flakatrolaran Atlantic Star, sum fleiri føroyingar eru við. Norðmenn, sum skulu gera sínar kanningar longst norðuri, eru longu farnir, russar gera sínar royndir í miðjuni og loysa skjótt, meðan Skálaberg, sum verður sunnastur, loysir ætlandi eisini í dag.

Øll trý skipini hava eina farleið, sum tey skulu fylgja, meðan royndirnar verða gjørdar.

### Íslendskur styrkur

Í tíðarskeiðinum, sum royndirnar við Skálabergi fevna um, fer skipið at royna eftir kongafiski.

Royndirnar við nýggju útgerðini vara ætlandi í einar 14 dagar, og tá hesar eru lidnar, fara fólkini, sum við eru fyri Fiskirannsóknarstovuna og íslendska Havgranskingarstovnin, til lands aftur við øðrum skipi, samstundis sum Skálaberg fer nýggjan túr.

Við Skálabergi verður eitt nú Fróði Skúvadal, fiskifrøðingur, sum er við fyri Fiskirannsóknarstovuna og ein íslendingur, ið starvast hjá íslendska Havgranskingarstovninum, sum er serfrøðingur í aukustikki.

Mourits M. Joensen, sum eisini starvast á Fiskirannsóknarstovuni, verður eisini við á kanningarferðini, og hann fer at taka stakroyndir úr fiski, sum veiddur verður undir kanningunum.

ES hevur eisini møguleikan at verða aktivt við, men luttekur ikki við skipi ella manning.

### Alt skrásetast

Leon Smith á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at nýggja ekkolodsútgerðin er eitt viðurkent mátitól, sum við røttum stillingum skrásetir data, sum eisini kann brúkast í stovnsmetingum og vísindaligum kanningum annars.

- Vit fegnast um, at hetta millumtjóða samstarv eisini gongur um vinnuna, tí tað hevur stóran týdning, at vinnan er partur av okkara skrásetingar- og skjalaarbeiði.

Hann vísir á, at nýggja útgerðin skrásetir bæði nøgd av fiski og knattastøðu.

- Sjálvandi sær ekkoloddið ikki sjálvt, hvat slag av fiski talan er um, men tá verður trolið skotið, og tóvið vísir, hvør fiskurin er, sum sæst á loddinum, sigur Leon Smith.

### Skrásetir tonsatal

Fróði Skúvadal, fiskifrøðingur, sigur, at tá ið tóvað verður, har ekkoloddið hevur staðfest skrivt, fæst ein